# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Vagnur Dam, Tórshavn**, andaðist á Lágargarði fríggjadagin, 80 ára gamal. Bønarhald verður á Láargarði mánadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13. Tey, ið ynskja at minnast Vagn, kunna lata Lágargarði eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Sverre Kruse á Eiði** andaðist á Korndalsbýlinum á Eiði fríggjadagin 12. desember, 89 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju týsdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Sverra, kunnu lata eina peningagávu til Korndalsbýlið á Eiði, konto í peningastovnunum.

**Sanna Nolsøe, ættað úr Vági** búsitandi í Herlev, andaðist hósdagin á Omsorgcentret Hjortespring, 74 ára gomul. Kórseting verður týsdagin klokkan 13 í Herlev kirkju.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Sverre Kruse**
Eiði

andaðist á Korndalsbýlinum á Eiði fríggjadagin 12. des., 89 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju týsdagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Gunnar og Brynhild v/ familju**

Tey, ið vilja minnast Sverra, kunnu lata eina peningagávu til Korndalsbýli á Eiði, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona og mamma, vermamma, omma, og langomma okkara

**Noomi Solmunde**

doyði og varð jarðað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhannes, Marjon, Paula, Páll og Anita v/ fam.**

**Dagurin**
**15. desember. Nikatius**, deyður í 5. øld. Biskupur í Reims í Fraklandi. Varð fyribeindur av heidningaflokki av Húnalondum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Próvhandan á Tekniska Skúla í Tórshavn

Á samkomu á Skúlaheiminum fríggjadagin 12. desember var próvhandan hjá lærlingum. Umleið 120 fólk vóru til samkomuna. Áðrenn Egon Øregaard skúlastjóri handaði prógvini helt Klæmint Weihe, lærari á el-deildini á skúlanum, røðu, og Anna Maria Olsen og sang nakar jólasangir til klaverspæl hjá Árna Øregaard. 24 lærlingar fingu prógv, 4 elektrikarar, 5 húsasmiðir, 13 maskinsmiðir og 2 bilsmiðir.

*Myndir: Páll Berg*



***Maskinsmiðir:*** *Aftast f.v.: Aagi S. Niclasen, Miðvágur (J.K. Joensen), Bárður S. Johansen, Miðvágur (J.K. Joensen), Bjarni Joensen, Hov (P/f Tangavirkið), Dan Erik Restorff Mouritsen, Tórshavn (P/f NomaTek), Hans í Gerðinum, Vestmanna (P/f MEST), Heðin E. Poulsen, Sumba (P/f Tangavirkið), Hilmar Joensen, Miðvágur (J.K. Joensen), Jóannes Jespersen, Hvalba (Sp/f Bærentsen Teknik), Jóhan R. Jacobsen, Tórshavn (P/f MEST), Johannus Hansen, Sandavágur (P/f MEST), Klæmint A. B. Vágadal, Sørvágur (P/f MEST), Torbjørn T. Lützen, Tórshavn (P/f MEST) og Tórodd Kruse, Oyrabakki (P/f NomaTek).*



***Bilsmiðir:*** *F.v.: Bergur Mortensen, Streymnes (Sp/f Nordbil), og Bjarti Ryan Petersen, Klaksvík (P/f Reyni Service).*



***Elektrikar:*** *F.v.: Brian Bech Jacobsen, Tvøroyri (Sp/f SIMO), Heini Magnussen, Tórshavn (ELMEK), Jóhan á Lakjuni, Fuglafjørður (Sp/f EL-Talvusvirkið) og Jóhan Magnus K. Olsen, Saltnes (P/f LM Electric).*



***Húsasmiðir:*** *F.v.: Áki Müller, Kvívík (Sp/f Nordhaus), Áki Troest Hansen, Saltangará (Sp/f Búsetur), Dan Sofus Hofgaard, Tórshavn (Heini Heinesen), Suni Roel Joensen, Argir (P/f Articon) og Sverri Tórstún, Tórshavn (Heini Heinesen).*